# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík

________/________ Síða

Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig, skr.

**Býráðsfundur mánadagin 14. desember 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

Hanna Jensen var bert við til viðgerðina av máli nr. 1 og 2

**Fundurin lokin kl. 20.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00426**<br>**Broyting í byggisamtykt - skjótibreyt**<br>Í sambandi við at áhugafelag Eysturskot er stovnað, er økið til skjótibreyt úti á Hagaleiti umrøtt.<br><br>Økið sum er avsett til skjótibreyt er niðanfyri fjósið á matr. nr. 429.<br><br>Økið hevur áseting J, ið er landbúnaðarøki og skal broytast til áseting F ið er Alemnn frítíðarøki og mentanarøki.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at broyta byggisamtyktina fyri økið til skjótibreytina frá áseting J ið er landbúnaðarøki til áseting F ið er Almenn frítíðarøki og mentanarøki. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen.<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Árni Jacobsen |
| 2. | **16/00419**<br>**Umsókn um stuðul til Reysta.**<br>Umsókn stuðul á 100.000,00 kr. frá svimjifelagnum Reysti.<br><br>Mentanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og mælir til, veita stuðul á 100.000 kr. við ársbyrjan 2017. Peningurin veður tikin av konto 5.24.14.510 *(Stuðul til Ítrótt)*<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |
| 3. | **16/00417**<br>**Umsókn um keyp av lendi til matr. nr. 180 av 147d í Leirvík**<br>Umsókn er móttikin frá borgara, sum ynskir at keypa uml. 100 fermetrara av matr. nr. 147d at leggja til matr. nr. 180.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at broyta byggisamtyktina frá áseting H til áseting B, og at | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 14. desember 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

Hanna Jensen var bert við til viðgerðina av máli nr. 1 og 2

**Fundurin lokin kl. 20.45**

selja uml. 100 $m^2$ frá matr. nr. 347d til matr. nr. 180, tá ið byggisamtyktin er broytt.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4. 16/00360**

**Umsókn um keyp av lendi av matr. nr. 389a til 389f í Leirvík**

Umsøkjari hevur ynski um at byggja út, víðka um húsini og søkir um loyvi at keypa part av, ella alt stykkið matr. nr. 389a.

Økið sum søkt er um, er lagt út til spælipláss og hevur partvís áseting B ið er sethúsaøki og áseting H ið er Frílendi. Hartil er matr. nr. 389h eisini granni til 389a.

Umsitingin mælir frá at ganga umsókníni á møti.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá umsitingini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**5. 16/00389**

**Minnisvarðin í Leirvík matr. nr. 195i**

Eysturkommuna hevur móttikið skriv frá minnisvarðanevndini, har nevndin ynskir at handa Eysturkommunu minnisvarðan og ognina, ið hoyrir hartil til, til ognar.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at kommunan yvirtekur minnisvarðan og ognina, ið hartil hoyrir.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**6. 16/00412**

**Keyp av jørð í Norðragøtu**

Uppskot til keyp av jørð í Norðragøtu sambært býarætlanini og byggisamtyktini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 14. desember 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

Hanna Jensen var bert við til viðgerðina av máli nr. 1 og 2

**Fundurin lokin kl. 20.45**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at keypa matr. nr. 86a ið er 20.036 fermetrar stórt.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til at gera eina heildarætlan fyri útstykking frá Eyðargøtu og inn til tunnilsvegin.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Peningurin verður tikin av konto 6.22.11.510-10
*(Byggibúning, bústaðir - útstykkingar)*

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Tollakur Joensen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Árni Jacobsen ______________________